## Adressumálið – triði partur

# Illgruni um land

## Greinarøð



Hanus Kamban

### Adressan verður send

Tað eydnaðist adressumonnunum at savna saman 3.242 undirskriftir til stuðuls fyri bønarbrævinum til bretsku stjórnina. Tann 17. apríl 1917 bleiv bønarbrævið fjarritað til tann danska sendiharran í London. Tveir dagar seinni, tann 19. apríl, fekk bretski sendiharrin í Havn, A.G. Coates, sendandi við postinum ein stóran brævbjálva við adressunum. Hann sendi brævbjálvan aftur til sendaran óupplatnan.

Sum fyrr nevnt varð adressumálið, upprunaliga ein spurningur um vøruflutning og um at forða fyri hungursneyð, umbroytt til at gerast eitt amboð lutvís í føroyskum, lutvís í donskum politikki.

Í hesum seinasta sambandi vórðu adressumenninir skuldsettir fyri við beráddum huga at hava gingið uttan um danskar myndugleikar, tá ið teir vendu sær til bretsku stjórnina, og rikið varð framundir, at teir høvdu framt ríkisskaðiligan atburð.

### Var adressan neyðug?

Áðrenn komið verður inn á henda spurning, skal verða hugt at, hvørt adressuátakið var neyðugt, hvørt tað kundi hugsast at vera vandamikið, og hví so øgiligt rok stóðst av einum slíkum, sakliga sæð, praktiskum máli.

Um tann fyrra spurningin er at siga, at alt bendir á, at vøruflutningurin til Føroya tað vandafulla árið 1917 var í góðum hondum. Bæði danska stjórnin og vørunevndin royndu allar útvegir til at tryggja Føroyum vøru, og Rytter gjørdi sum formaður í vørunevndini sítt arbeiði til lítar. Sum longu nevnt fór farmaskipið *Ísland* tann 2. apríl úr Keypmannahavn til Føroya við 700 tonsum av varu. Heitt varð á fólk um at velta eplir, røtur og korn. Og veruleikin er helst, at hóast tað mangan var smátt, var ongantíð hungur í Føroyum.

Eftir nýggjár 1918 kom vøruflutningurin so við og við í eina tryggari legu. Á sumri 1918 var skipaferðslan komin í rættlag, bæði av teirri grund at USA var komið upp í bardagan, og av at Týskland nú var nógv viknað. Í sínum verki metir H.A. Sølvará, at adressuátakið kann hava havt nakað av ávirkan tann rætta vegin fyri Føroyar, men at henda ávirkan ikki var avgerandi.

### Vansar við adressuni

Næsti spurningur er, hvørt átakið hjá adressumonnunum á nakran hátt kann hava verið vandamikið. Til hetta er at siga, at Føroyar jú vóru partur av tí danska ríkinum, og at Danmark, sum uttanveltað land, sum royndi at skáksigla millum tvey stórveldir í blóðugari uppgerð, var í eini ovurhonds viðkvæmari støðu.

Av tí sama varð tað vanlig hugsan, at allar samráðingar millum tað uttanveltaða landið og krígsveldini áttu at vera røktar av professionellum fólki. Scavenius var professionellur, og tað var Rytter í ein vissan mun eisini. Men Jóannes Patursson og Andrias Ziska vóru ikki diplomatiskir fakmenn, og høvdu, sum tað tykist, lítlan áhuga fyri tí stórpolitisku heildarmyndini.

Umráðandi var, at ein mótpartur í krígnum fekk so lítla vitan sum gjørligt um flutning ella um vøru ella um, hvat eitt land hevði niðurfyri. Tað var tí um at gera, at so lítið sum gjørligt lak út um handilslig viðurskiftir, vørugoymslu, skipaferðslu ella vøruflutning. Nógv var, fyrst og fremst í Tingakrossi, funnist at vørunevndini, tí hon tóktist at vera hulin, men henda atferð hevði sínar góðu grundir.



Beretning til Landstinget,

Den af Tinget i Henhold til Grundlovens § 45 nedsatte Kommission

til Undersøgelse af forskellige færøske Forhold.

Kobenhavn.

*Frágreiðingin hjá landstingskommissiónini varð rópt Fúlabók*

### Spæl við eld

Men kanska mest avgerandi var, at sjálvt tey minstu kvink ein veg ella annan í Danmarkar uttanveltaðu støðu um hetta mundi kundu fáa avleiðingar, og at sersømdir frá bretum til ein danskan landslut í ringasta føri kundu havt við sær, at Danmark bleiv hersett av Týsklandi og soleiðis drigið beinleiðis upp í kríggið.

Hendi hetta, vóru Føroyar í somu løtu eisini ein partur av bardaganum. Ein kann t.d. bara gita um avleiðingarnar, um Danmark bleiv hersett av Týsklandi og Føroyar komu undir bretskt vald. Tað er ikki vist, at ein tilburður sum tann á Føroya Banka á sumri 1917, um hetta var støðan, bara hevði havt við sær materiellan skaða og miss.

Hetta, og ikki tann næstan høpisleyst tápuliga skuldsetingin um landasvik, var høvuðsvansin við adressuátakinum. Tað bar í hesum sambandi til at grundgeva fyri, at Patursson, Ziska og hinir adressumenninir spældu við eld í eini tíð og eini vandastøðu, har tað galt um at fara stillisliga um hurðarnar og at lata fakfólk gera tað neyðuga. Hóast tað neyvan varð sagt við greiðum orðum, kann hetta hava verið ein grund til, at vørunevndin, eisini Rasmus Rasmussen og S.P. úr Konoy, so staðiliga ávaraði ímóti adressuni.

### Hví ongin borgarfriður?

Men hví var henda støða



*Abraham George Coates var bretskur konsul í Føroyum frá 1907 til 1919*



*Andrias Ziska var formaður í adressunevndini*

sosialurin